# fyrimyndum



## Eyðgunn Samuelsen

Eg vil svara spurningin í tveimum, á persónliga og politiska planinum.

Í mínum uppvøkstri eru tað serliga tvær kvinnur, ið hava ávirka mín hugburð til tað at vera kvinna. Onnur er omma mín úti á Lið, sum vit nevndu hana, hon stríddist sum bóndakona alt sítt lív og hon vísti mær, at tað ikki var nøkur avmarking at vera kvinna, heldur tvørturímóti. Serliga vil eg siga, at hon vísti mær, at kvinnur kunnu fáast við alt arbeiði, ið tær hava hug til. Hin kvinnan er Betty ommusystir mín í Klaksvík, hon var útbúgvin cand.mag og var ein av teim fáu føroysku kvinnunum, ið læs niðri í 1930unum. Hon hevur ávirkað meg sera nógv viðvíkjandi mínum hugburði til útbúgving, og var avgjørt viðvirkandi til at eg fór undir útbúgving sjálv.

Politiskt eru fleiri kvinnur, men serliga Hillary Clinton. Hon hevur víst seg at vera eitt ótrúliga sterkt menniskja, ið, sum hon sjálv sigur, hevur barst fyri hvørjari rukku í andlitinum. Hon hevur verið drigin ígjøgnum fjølmiðlarnar fyri persónlig viðurskifti, av politiskum mótstøðufólki og verið kallað maktsjúk. Listin er langur og hon hevur klárað ótrúliga væl at tikið øllum mótgangi við "uppreistari" pannu. Nú stríðist hon fyri lívinum eftir at gerast forsetavalevni í USA. Síðan hon trein á vøllin, er tað ein trupulleiki at vera skikkaður til tað ið tú vil, tað verður alla tíðina ført fram, at hon er so væl skikkað til starvið sum forseti í USA, at tað verður gjørt til ein trupulleika. Havi ongantíð hoyrt at tað hava verið trupulleikar við monnum, ið hava bjóðað seg fram til politisk størv, at teir eru ov væl skikkaðir til starvið. Eisini havi eg stóra virðing fyri hennara styrki og vilja at stríðast. At hon eftir at hava tapt 11 uppstillingarval á rað hevur styrki til at halda áfram og so enntá vinna ber boð um eina kvinnu við ótrúligari styrki og harvið vísir hon øllum kvinnum at tær skulu ikki gevast á hondum, men stríðast fyri tí, ið tær halda er rætt.

## Annita á Fríðriksmørk



Nógvar hava tær verið, sum gingu undan. Bæði herheima og uttanlands. Bæði innan og uttan tinggátt.

Um vit halda okkum til løgtingskvinnur og landsstýriskvinnur so koma mær til hugs fyrimyndarlig nøvn sum Karin Kjølbro, Jóngerð Purkhús, Marita Petersen og Lisbeth L. Petersen. Hóast tað ikki eru so nógv ár síðani, at hesar tóku seg aftur í politikki, so hava tær í síni politisku tíð virka í einum mentunarligum mótburði, sum gav teimum eina politiska mótstøðu, sum gjørdi teirra politisku fet nógv tyngri enn okkara. Eri sannførd um, at hóast javnstøðan millum kvinnur og menn langt frá er rokkin, so eru teirra tøk viðvirkandi til, at vit eru komin so frætt á leið, sum vit eru.

Tak Tjóðveldi sum dømi: á tingi eru vit nú 4 kvinnur og 4 menn, og í landsstýrinum hava vit tvær kvinnur og tveir menn. Ein søgulig javnstøða, sum kann síggjast sum eitt positivt íkast til 8. mars 2008. Ein spíri, sum hevur sína rót í tí arbeiði og tí hugburði, sum vit ervdu frá teimum, sum undan gingu.



## Katrin Dahl Jakobsen

Nógvar eru í at velja. Alt frá Móður Teresu og hennara arbeiði fyri tey fátøku, kendi alis- og evnafrøðingurin Marie Curie, sum fyri sína slóðbrótandi gransking tvær ferðir fekk heiðursløn Nobels (1903 og 1911) til Gro Harlem Brundtland fyri hennara ótroyttiliga politiska arbeiði fyri Arbejderpartiet, serstakliga tá tað ræður um umhvørvið. Og ikki at gloyma Maritu – okkara fyrsta og higartil einasta kvinnuliga løgmann.

Fremst í huganum stendur tó Andrea Árting, sum saman við øðrum klókum og røskum konum fingu okkum líkaløn fyri líka arbeiði. Eitt megnartak, sum veruliga gjørdi mun, og sum tær einsamallar kláraðu uttan juristarí av nøkrum slag! Tær eru allar farnar, og mamma mín var ein teirra. Nakað høvdu tær fegnast, nú Ingeborg og hennara fólk arbeiða fyri fastlønarskipan fyri tímalønt. Hesar konurnar eg tosi um, vóru so framskygdar, at tær longu síðst í 60unum arbeiddu fyri at fáa barnagarð upp at standa fyri tey á Bacalao og Landssjúkrahúsinum. Kommunan vildi lata stykki í Hornabø, men læknar og annað fínt fólk hildu ikki tað var hóskiligt at lata teirra børn ganga saman við teimum hjá fiskafólkinum!

## Bergtóra Høgnadóttir Joensen

Kenni meg so hepna, tí eg havi veruliga nógvar góðar, hollar og praktfullar kvinnur í mínum lívi. Mamma mín, systir mín og ikki at gloyma vinkonur mínar. Tær hava allar serligan týdning fyri meg – hvør á sín hátt og eru mínar fyrimyndir.

Í mun til tingkvinnuyrki og tað at fara aktivt inn í politikk, er mamma (Karin Kjølbro) hon eg havi sparrað og kjakast mest við .... tí hon veit um nøkur, hvat tað vil siga, at vera tingkvinna. Hon hevur á allar hættir verið og er ein góð fyrimynd. Hevur bæði víst mær, at tað ber til, og hinvegin at tað ikki er 'bara-bara'. Hon fekk meg at hugsa meg væl um, áðrenn eg tók avgerðina, men hevur stuðlað mær, havt álit á mær og sparra nógv við meg. Hon er mín 1. floksmentorur og fyrimynd, vil eg siga.

Eisini hava eg eina so øðiliga góða systir. Umframt at hon kennir meg so sera væl, sigur hon altíð sína hjartans meining á ein konstruktivan hátt. Hon er tann sum sigur:"Skal eg siga tað tú fegnast vilt hoyra ella tað sum eg veruliga meini?" tá eg spyrji hana. Tað dámar mær SO væl, tí eg veit veruliga, hvar eg havi hana. Tað at vera ærligur og kostruktivur sum hon, er so uppbyggjandi, haldi eg.

